Framtaksgrunnurin nú fullmannaður

Fimmti og seinasti limurin í nevndini fyri Framtaksgrunn Føroya er nú valdur. Tað er Árni M. Dam, stjóri av Nomskála. Bjarnin Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum velur fyra av fimm nevndarlimum, og teir fyra velja sjálvir tann fimmta. Hinir nevndarlimirnir eru: Niels W. Poulsen, formaður, Dagmar Joensen, næstformaður, Eydna Justinussen og Sjúrður Horsdal.

-HR

Techno-Rokk konsert í Margarinfabrikkini!

KONSERT

Vár Gaard, praktikantur

Fríggjakvøldið 12. apríl kl. 22.00 verður ein Techno-Rokk konsert, í Margarinfabrikkini, við Side Effect og Lítla Rúm.

Margarinfabrikkin er einasta staðið í høvuðsstaðnum, har ung undir 18 ár regluliga hava høvi at hoyra livandi tónleik. Konsertirnar hildnar har einaferð ferðir um mánaðin, og nógvir bólkar hava spælt har áður. Millum aðrar: Dio, Happy, Side Effect, Krit, E.Pot, Lítla Rúm, Nirvada, HTV, Never-mind, Grýnt Fótslím, Diatribes og Tein.

Bæði Side Effect og Líttla Rúm hava spælt í Margarinfabrikkini áður, men fríggjakvøldið verður tað eitt sindur øðrvísi, við tað at gestirnir koma upp á pallin.

Við Side Effect koma tríggir og harumframt ein guitaristur og tvey sum syngja kór.

Lítla Rúm eru teir tríggir fýstu. Við sær hava teir ein sangara sum skal rópa eitt sindur aftanat.

VIÐMERKINGAR

At stinga fingurin í jørðina

Kári á Rógvi
formaður í Føroya Óalsfelag

Nú skiparbóndafelagið fyri fundi um landbúnaðarpolitikk, har umboð fyri politisku flokkarnar fáa høvi at siga sína hugsan um landbúnaðarpolitikkin komandi fýra árini.

Óalsfelagið kann ikki annað enn taka undir við, at politikararnir siga sína hugsan. So vítt veljararnir hvør í sínum lagi, hvørjum teir skulu atkvøða fyri.

Tá ábugafelóg skapa fyri pallborðsfundum, er vanligt, at øll tey politisku umboðini siga seg taka undir við sjónarmiðunum hjá jústi tí felagnum, sum hevur skipað fyri fundinum. Vónandi hendur onki slíkt bóndafangaví á fundinum, tí fleiri enn bóndurnir hava áhuga í jørðini.

Óalsfelagið mótmælti haraldliga tí áliti, sum var lagt fram seinasta vár. Hetta var serliga vegna uppskotið til lóg um búnaðarjørð. Tað uppskotið var eitt uppskot um miðsavnaða styring av øllum landbúnaðinum, eisini óalsbrúkum og traðarbrúkum.

Virkumálastýrið tók til teirra rós ikki undir við uppskotinum um lóg um búnaðarjørð. Tíverri vórðu tær ásetingarnar tó fluttar yvir í uppskotið um privatisering av landsjørðini. Hesum taka vit ikki undir við. Fyri tað fyrsta dámar okkum ikki, at tvey slóg av ognarjørð skulu vera í landinum. Fyri tað seinna dámar okkum als ikki, at tvey slóg av ognarjørð skulu vera í sama haga, har sum ogn og longs í dag liggja saman í felagshaga.

Óalsfelagið smíðaði sjálvt try lógaruppskot, sum vit hava lagt fyri politisku flokkarnar til kunningar.

Fyrsta uppskotið er at broyta matrikulló gina til tess at gera sundurbýti av jørð lættari og lógligari. Vit vilja hava ásetingar um mínstustíddir innangarðs og uttangarðs, heldur enn sum í dag at tað ongantíð ber til at býta matrikulnummur sundur.

Annað uppskotið er at lata traðarnar um traðir til ognar fyri eitt ámiligt gjald. Traðarfólkið er als ikki tikið upp á tungu í álitinum um landbúnaðarpolitikk. Hevur nakar uppiborið at sleppa at keypa almenna jørð, so eru tað tey, ið hava valt hvørn bólk og lagt blóð, sveitta og tár í at skapa góðar-ríkar teigar.

Tríggja uppskotið er at lata smáu festarunum festini, somuleiðis fyri eitt ámiligt gjald. Smáu festarnir hava oftast jørðina í felagshaga, í mongum førum sama haga sum vit óalsmenn. Tørvur brúk eru at meta javnt við óals og traðarbrúk í øllum lutan, uttan júst tað, at teir ikki eiga jørðina. Vit eru avgjørt ímóti politikkinum hjá jarðarríkinum at leggja saman smáu festini.

Óalsfelagið vil ikki leggja seg út í, hvat skal henda á teimum økjum, sum vit ikki sjálvir vera av. Men, vit kunnu hugsa okkum, at fleiri hagar gerast felagshagar, serliga nærhendis Tórshavn, Klaksvík og øðrum stórum plássum. Um bóndurnir sleppa at keypa garðarnar og síðani selja okkum hagarnar burtursæð og í staðin leggja seg eftir at framleiða mjólk, ella bóndurnir fáa eitt endurgjald fyri at láta hagarnar frá sær, og at teir síðani verða seldir tað er okkum líka mikið.

Avgerandi fyri okkum er, at tað vera fleiri traðir, meiri óalsjørð og lættari at ogna sær óalsjørð.

I Býin

Casablanca Ristorante
WEEK-END TILBOÐ
Bar-B-Cue
OKSAKJØT
LAMBSKJØT
KALKUN
SVÍNAKJØT
SKINKA
PYLSIR
EXOTISKIR SØSIR
YMISKAR DRESSINGAR
GRØNMETI
SALATIR
POMMES FRITTES
Veljið sjálvi, og lat Okkara kok steikja tað.
ET TAÐ TÚ ORKAR
BERT 98,-
Bileggið borð á tlf 319696

NÁTT-BUSSURIN
hjá Mouri Christensen
Leygarkvøldið í:
• Vetur.-Tórsh. kl. 22.30
• Tórsh.-Vetur. kl. 00.30
• Vetur.-Tórsh. kl. 02.30
• Tórsh.-Vetur. kl. 04.30
(Køyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Tlf. 42 42 54
Bussarnir: Tlf. 288254

BAROK

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO 311234

Hafnia Lounge
- Stórt úrval av kalli
- Dagsins leiðin
- Sandwich
- Flógv karta við salati
- Vinlisti "smakka"
- Smyrjibrøyð frá kl. 14-17
Tf: 31 22 88 - Fax 31 22 89

ÍBýin
- hvønn hósdag

HOTEL ★★★ ÓRAVÍK
Miðstovan hjá Órar
Hvørt fríggja- og leygardagskvøld:
-Reiðskiklandi
-Steikar el. fransksar bøffir
Pris.....155,-
Hvørt leygardagskvøld millum kl. 12.00 og 13.00
-Suppa
-Steik
-Dessert
Pris.....128,-
Bankastovnsgøta 6
Tlf.: 57 13 01
Fax: 57 20 57

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 12. apríl
• "Fimmari"
• Sjavskapping frá kl. 19.00
UNDIRRÆÐD
Leygardagin 13. apríl
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00-04.00
"COCKTAIL" spæla

Felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
Flúrar
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Leygarkvøldið bingo kl. 20.00
Felagið Tórshøll Sverrisgøta 22 Tlf. 31 15 65

ÚT AT ETA - Lat okkum um Uppvaskið:
MENU VIÐ 3 RÆTTUM
Einans 195,00 kr.
RIO BRAVO RESTAURANT
Tlf 319767
Ræklubland Angus-búffur við pipar- ella Bernaise-sós
Ís-dessert
195,00 kr
Borðbiðgging á tlf. 319767

HESA VIKUNA
Høskvøldið
DJ Kristin Jensen
Fríggjakvøldið
Ladies night & Happy Hour
DJ Marjon Petersen
Leygarkvøldið
80'ara kvøld við Eyðfinn Sigurstein
Fótbóltur á stórskiggja
Cafe'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
EINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 26
www.club20.fo

ÍBýin
- hvønn hósdag

Mat-seðilin
Hósdagin 11. apríl: gyros
Fríggjadagin 12. apríl: kálvafrikassé
Leygardagin 13. apríl: rullusteik
Mánadagin 15. apríl: kalkunfrikadellur
Tysdagin 16. apríl: stokt flesk
Mikudagin 17. apríl: hamburgarrygg
***
Seinnaparts-TILBOD frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgariella Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

fríggjakvøldið 13/04
DJ Allen Poulsen
Ladies Night
Kenufólk ókeypis ergengd Áðrenn kl. 01.00
leygarkvøldið 14/04
DJ Allen Poulsen
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque

Kaggin
Hetta vikuskiftið spæla
Fluffy Toys again
KAGGIN
www.kaggin.fo